

Høgni Hoydal

# Landsstýriskvinnan fremur brot á rættindi og heimildir hjá lesandi og útbúgvingarstovnum

Undirritaði spurdi undir løgmansrøðuviðgerðini fyri viku síðani, Helenu Dam á Neystabø, henda spurning: Um hon helt seg vera á lógligari grund, tá Mentamálaráðið hevur givið Fróðskaparsetrinum boð um ikki at taka skikkaðar umsøkjarar inn. Hetta hóast útbúgvingarnar hava bæði pláss og undirvísingartímar, men landsstýriskvinnan sigur seg ikki hava nóg mikið av peningi til lestrarstuðul á fíggjarlógini. Tá svaraði landsstýriskvinnan, at hendan rætt hevði hon.

Nú er so komið í ljós í Útvarpi Føroya, at hesi boð landsstýriskvinnurnar hava persónliga rakt 20 umsøkjarar til lærara- og pedagogútbúgvingina á Fróðskaparsetrinum.

Men eg meti, at landsstýriskvinnan fer greitt út um sínar heimildir og skyldur - bæði mótvegis einstøku umsøkjarunum, og mótvegis fakliga rættinum og óheftninum hjá Fróðskaparsetrinum.

Í fyrsta lagi hevur Landsstýriskvinnan ongan rætt at leggja seg út í upptøkuna av lesandi á Fróðskaparsetrinum. Tað eru útbúgvingarnar sjálvar, ið gera av upptøkuna av skikkaðum næmingum í mun til játtan og lærarakreftir. Og her er ongin farin út um játtan.

At landsstýriskvinnan ikki hevur mett rætt um játtanina til lestrarstuðul, er hennara egni kleyvarskapur. Tí tað hevur verið kent síðani seinastu fíggjarlóg, hvussu nógv pláss og nemingatal kann rúmast á Fróðskaparsetrinum við tillutaðu játtanini.

Tað kunnu ongantíð vera útbúgvingarstovnarnir og umsøkjararnir, ið skulu fáa ábyrgdina av, hvussu stuðulssjáttanin er umsitin og rikin.

Útbúgvingarpláss og lestrarstudningur eru hvør sín skipan, ið als ikki kunnu blandast saman.

## Grovur mismunur móti fólki

Í øðrum lagi er hetta grovt brot á rættindini hjá skikkaðu umsøkjarunum, ið nú hava fingið krakk, og eyðsýndur mismunur, ið verður framdur:

- Hvussu ber tað til, at júst hesi, ið hava søkt á pedagog- og læraraútbúgvingina ikki hava møguleikan, tí studningur skal vanta?

- Hví eru tey vald út og frá millum øll onnur, ið eisini hava søkt á Fróðskaparsetrið ella til at lesa uttan fyri Norðurlond?

- Er talan um, at landsstýriskvinnan nú situr og pilkar ávís fólk frá, ið ikki skulu sleppa at lesa, hóast pláss er og tey eru skikkað?

- Hevur landsstýriskvinnan givið øðrum av útbúgvingunum somu boð, men tey hava mett boðini verið ólóglig?

Til tess at lýsa, hvussu álvarslig og skeiv atferðin hjá landsstýriskvinnuni er, kunnu vit taka eitt dømi:

Stuðulsstovnurin letur studning til hægri lestur uttan fyri Norðurlond. Um nú knappliga 200 føroyingar fleiri søkja í Skotlandi, Fraklandi, Týsklandi ella Japan - og tey sleppa inn, tí tey eru væl skikkað. Kundi landsstýriskvinnan tá bara ringt til Universitetini uttanlands og biðið tey latið vera at tikið hesar føroysku næmingar inn, tí hon hevur ikki nóg stóra játtan til lestrarstudning?

- Ella kundi hon bara givið Fróðskaparsetrinum ella Sjómansskúlunum boð um at venda skikkaðum umsøkjarunum í hurðini, tí nøkur onnur vóru farin avstað við studninginum?

Tjóðveldi fer at tryggja, at hetta mál verður fylgt upp í løgtinginum og lýst til fulnar. Her skal vera lóg, landaskil, rættartrygd og verja móti mismunarviðferð. Hóast vit hava eitt landsstýri, ið ikki sær út til at skilja, hvat tey virðini merkja.

# Merkisdagar

### Gullbrúdleyp

Fríggjadagin 13. august kunnu Ásla og Tórbjørn Poulsen í Havn halda gullbrúðleyp. Veitsla verður sama kvøld fyri innboðin. Tey sum annars hava hug at hitta brúðarparið eru vælkomin heima í Bóndabrekku leygardagin eftir kl. 15.

### Silvurbrúdleyp

Týsdagin 10. august hava vit, Paulina og Erik Eliasen, Syðradali K, verið gift í 25 ár. Vit halda dagin á Syðradali. Opið hús verður leygardagin 14. august frá kl. 14.30 til kl. 23. Sam siglir av Klaksvík kl. 14.15 - 17.15 - 22.15. Av Syðradali kl. 17.35 - 22.35.

### Silvurbrúdleyp

Týsdagin 17. august hava Jónleyg og Fríðálvur Bláhamar, Vestmanna, verði gift 25 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 21. august frá kl. 12 til 18 í ítróttarhøllini í Vestmanna. Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum, verða vinaliga biðin um at siga frá innan 4. august á tlf. 424407.

### Silvurbrúdleyp

Týsdagin 17. august hava Emly og John H. Petersen Klaksvík verið gift í 25 ár. Veistlan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19 fyri innbodnum.

### Silvurbrúdleyp

Mikudagin 8. september hava Alith og Hilmar Djurhus Strendur silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin fríggjadagin 10. september kl. 18 í bygdarhúsinum á Strondum. Tey ið ynskja at gleðast saman við okkum verða vinarliga biðin um, at siga frá innan 24. august á tlf. 448534/224635.

### 90 ára føðingardagur

Mikudagin 18. august verður Elsa av Reyni 90 ár. Dagurin verður hildin í Starvsmannafelagshúsinum J.H. Schrøtersgøtu 9. Tey, ið kundu hugsað sær at heilsa uppá Elsu, eru vælkomin millum kl. 16 og 20.

### 90 ára føðingardagur

Týsdagin 17. august verður Jóhan Norðfoss, Tórshavn, 90 ár. Tey, ið ynskja heilsa uppá Jóhan, eru hjartaliga vælkomin í húsið hjá Starvsmannafelagnum 21. aug. frá kl. 12 til 16.

### 85 ára føðingardagur

Leygardagin 14. august verður Petur Jacobsen, Nes Eysturoy, 85 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

### 80 ára føðingardagur

Fríggjadagin 13. august fyllir Bodil Hansen ætta úr Rituvík, búsitandi í Sønderborg, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttruni í Frederikshavn leygardagin 14. august kl. 11. Adr.: Kastanievej 9, 9900 Frederikshavn.

### 80 ára føðingardagur

Mánadagin 16. august verður Jóhan Lervig, fyrrverandi smiðjumeistari á Skála, 80 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin 15. august kl. 16 í ítróttarhøllini á Skála, har øll eru vælkomin.

### 80 ára føðingardagur

Mánadagin 16. august verður Erling Hansen Funningsfjørður, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini, Tjarnarlág 15, Tórshavn, sama dag millum kl. 17 og 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 75 ára føðingardagur

Leygardagin 21. august fyllir Elisabeth Joensen í Vági, fyrrverandi fyrustøðukvinna hjá heimarøktini, 75 ár. Í hesum sambandi bjóðar Elisabeth til brunch í Billiardhúsinum, leygardagin 14. august, frá kl. 10-15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 70 ára føðingardagur

Sunnudagin 22. august verður Páll Jóanesarson Saltangará 70 ár. Dagurin verður hildin í hølinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag frá kl. 17. Øll eru vælkomin.

### 65 og 75 ára føðingardagur

Leygardagin 21. august halda Jensya Magnussen (Kastalag) 75 ára og Karin Kastalag 65 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í húsinum hjá Eldrafelagnum NÓN, Torvgøta 2 í Saltangará frá kl. 13 – 19.

### 60 og 70 ára føðingardagur

Í dag 13. august fyllur Sólbjørg Thomasen, Tórshavn, 60 ár og fríggjadagin 27. august fyllur Hilda Debes, Oyri, 70 ár, Systrarnar halda føðingardagin í Eydnuni á Oyrabakka leygardagin 28. august kl. 17 og úteftir. Tey, ið ynskja at heilsa uppá okkum verða vinarliga biðin um at siga frá innan 23. august á tlf. 313448/503448 (Sólbjørg) ella 422234/266334 (Hilda)



